

*– Eg undrist á menniskjansliga heilan. Á, at tað yvirhøvur er liviligt hjá okkum menniskjum á hesi planetini. So valið er greitt. Antin er upprunin til alheimin fyri 15 milliardum síðan ein tilvildarlig spreinging, ella stendur ein skapandi máttur aftanfyri. Eg havi valt seinna svarmøguleikan, sigur 51 ára gamli farmaceuturin, Richard Schwartson*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Hann vil hava, at vísindamenn við eini ateistiskari dagsskrá viðurkenna ivamálini í teirra tesum. At fakfólk, sum skriva lærubøkur til okkara fólkaskúlar, eru erlig og viðurkenna, hvørjar tesur eru prógvaðar, og hvørjar framvegis eru gitingar og trúgv.

- Tá eg sum 12 ára gamal drongur í Klaksvíkar Skúla opnaði mína lívfrøðibók og las, at "livet opstod i havet", so billaði lærubókin mær inn, at hetta var fakta. Í staðin skuldi staðið, at spurningurin um lívsins uppruna framvegis er ógreiður, men at vit hava ymisk ástøði og gitingar, sigur Richard Schwartson.

Hann harmast um eina eintáttaða undirvísing um hetta evnið. Og hann krevur, at ein ament stuðlað lærubók í einum alment fíggjaðum skúla eigur at vera erlig, tá skúlabørn læra um lívsins stóru spurningar.

- Vit skulu ikki leggja eina teori fram sum fakta, um hon ikki er fakta, slær Richard fast.

## Upplivingin av Gudi

Eitt er grundgevingin fyri eini fyrstu orsøk til sjálvt lívið. Eini trúgv á nakað, sum er størri enn vit og uttanfyri okkum. Men hevur trúgvin á Gud nakran týdning fyri lívið hjá Richardi?

- Eg eri trúgvandi kristin og havi eina persónliga uppliving av Gudi í gerandisdegnum. Hesin Gudurin er opinberaður ígjøgnum son sín Jesus Kristus, sum Bíblian talar um. Hetta er tað privata, persónliga og subjektiva aspektið av spurninginum um Gud, sigur Richard.

Men hvussu er hesin Gudurin vorðin persónligur? Hví júst tann kristni Gudurin?

- Tá kemur mín persónliga uppliving inn í myndina. Vísindin er objektiv. Tann persónliga upplivingin er subjektiv. Upplivingin av, at hesin Gudurin gevur vón og meining. Og hesa uppliving kann eg ikki kjakast um ella prógva rationelt. Trúgvin á kristindómin kann ikki mátast og vigast. Eins og tú heldur ikki kann máta og viga eitt tónleikaverk hjá Mozart, sum kortini bergtekur og fær teg at undrast, sigur Richard.

Richard greiðir frá, at trúgv hansara kom á ungum árum. Men eygleiðingar hansara av alheiminum hava síðani økt um forvitnið og styrkt trúnna á máttin handan alt lív.

- At trúgva á Gud er ikki at bíta tenninar saman og blunda. At trúgva á Gud er eitt lop, sum víðkar sjónarringin og opnar eyguni fyri eini nýggjari andaligari dimensión. Tilveran er sum ein leykur við fleiri løgum. Eitt er tað fysiska. Tað, sum vit kunnu sansa. Eitt annað er tað andaliga. Tað, sum er uttanfyri okkum sjálvi. Og lívið gerst fátæksligt, um vit ikki eru opin fyri hesi dimensión, sigur Richard Schwartson at enda.